

*Røktar- og Ellisheiminum í Runavík.*

# Yndisligar myndir hjá Marthu Johansen

**Herfyri læt listaframsýning upp á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík. Hetta er fyrsta framsýning av slíkum slagi, sum nakrantíð hevur verið á heiminum. Framsýnari er Martha Johansen av Strondum, og listaverkini hjá henni eru sonevndar íseymaðar myndir**

LISTAFRAMSÝNING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Martha Johansen byrjaði at ganga á kvøldskúla hjá Evu Andersen á Strondum í 1999 og fekk stóran áhuga fyri hesi listargrein.

Myndirnar hjá henni eru vakrar, og motivini eru í flestu førum bygdir og bygdaløg.

Tá ið framsýningin læt upp, segði leiðarin á Røktar- og Ellisheiminum, Tordur J. Niclasen, nøkur orð.

Í fyrsta lagi takkaði hann Marthu og ommudóttir hennara, Andreu, fyri, at tær høvdu tikið stig til hesa framsýning – og fyri, at tær høvdu valt røktar- og ellisheimið til framsýningina.

### Søguligur dagur

- Hetta er ein søguligur dagur, tí hetta er fyrstu ferð, at slík framsýning verður hildin á heiminum.

Tordur segði, at tá ið hann henda morgunin, sum framsýningin læt upp um kvøldið, gekk runt og hugdi at verkunum hjá Marthu, birtist honum nakað í barmi, sum hann tók til:

- Eg bleiv líkasum førdur aftur til barnaárini. Tann hugnaliga bygdin, friðfulla umhvørvið, teir gomlu hvílandi á planka, børn og høsn í túni – ja, tá gjørdust orðini hjá skaldinum so livandi fyri mær:

*"Hvar enn eg man fjakka,*
*so leitar hann hagar,*
*mín hugur, har sorgleysur*
*dagur mín rann.*
*Ei nakað kann metast við*
*barndómsins dagar.*
*Bert minnini liva um*
*skeiðið sum svann..."*

### Tryggleiki og hugni

- Fyri mær anga hesar myndir hjá Marthu av friði, tryggleika og hugna. Eisini kemur kærleikin og umsorganin til sjónar. Sambandið millum hirðan og seyðin, og tá hesin ikki orkar meira ella er skaddur, leggur hirðin hann á herðarnar. Hetta er yndisligt, segði Tordur og ynskti Marthu Johansen tillukku við framsýningini.

Hann helt tað vera gott, at Røktar- og Ellisheimið eisini kann nýtast til slík endamál.

- Á henda hátt verða dyrnar latnar upp fyri eini verð, sum annars bert er at finna í listaskálum og øðrum framsýningarhølum, segði Tordur J. Niclasen, leiðari á Røktar- og Ellisheiminum í Runavík.



*- Myndirnar hjá Marthu Johansen eru yndisligar, segði Tordur J. Niclasen*

*Mynd: Andrea á Regni Højgaard*



*Martha hevur gingið á kvøldskúla hjá Evu Andersen á Strondum*

*Mynd: Andrea á Regni Højgaard*



*Motivini eru bygdir og bygdaløg*

*Mynd: Andrea á Regni Højgaard*